gult24 cyan24 magenta24 svart24



# Ingibjørg fekk ikki heiðursmerki



*Ingibjørg Poulsen gjørdist nummar fýra í kappingini í kúluvarpi*

**Ingibjørg Poulsen gjørdist nummar fýra, tá kappast varð í kúluvarpi sunnudagin**

KÚLUVARP
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen – Isle of Man*

Tað eydnaðist ikki hjá Ingibjørg Poulsen at verja bronsumerkið, sum hon vann sær á Oyggjaleikunum á Gotlandi fyri tveimum árum síðani. Ein skaði í knænum darvaði føroyska kastaranum nakað í kappingini, men hóast hetta ikki hevði verið so, hevði talan neyvan verið um heiðursmerki.

Longsta kastið hjá Ingibjørg var í fimtu royndini, tá hon tveitti kúluna 10,72 metrar út á vøllin, og er hetta 18 sentimetrar undir føroyska met hennara.

Bronsumerkið varð tó vunnið við 11,67 sentimetrum, so har hevði hóast alt verið torført at gjørt nakað.

Sjálv tóktist Ingibjørg eftir kappingina eitt sindur irriterað um skaðan í knænum, sum forðaði henni at koma nóg langt niður í beinunum, men hinvegin gleddist hon um, at tað hóast alt eydnaðist at gerast nummar fýra. Fimta plássið fekk ein kastari við 10,71 metrum. Altso einum sentimetri minni enn Ingibjørg.

# Finaluplássið varð tryggjað

**Eina løtu valdaði ivi um, hvørt Magni Mouritsen hevði runnið seg í finaluna á 800 metra teininum**

RENNING
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen – Isle of Man*

Magni Mouritsen luttekur í ár fyri fyrstu ferð á Oyggjaleikum, men longu nú hevur hann so tryggjað sær eitt finalupláss.

Hetta hendi, tá hann sunnudagin tók lut í 800 metra renningini, har talan var um tvær hálvfinalur. Undan kappingini varð sagt, at tríggir teir bestu rennararnir umframt teir báðir við næstbestu tíðunum komu í finaluni, men beint undan startinum fingu rennararnir at vita, at talan bert gjørdist um seks luttakarar í finaluni. Teir báðar bestu í hvørjari hálvfinalu, umframt teir báðar við næstu tíðunum.

Magni kom á mál sum nummar fýra í sínum bólki, og tíðin var nóg góð til at vera millum átta teir bestu, men ikki seks teir bestu. Eina løtu valdaði ivi um, hvørt talan var um eitt finalupláss, men eftir at dómararnir høvdu trætast eina løtu, var kortini greitt, at hann var í finaluni.



*- Beinini doyðu bara fullkomuliga seinasta pettið, sigur Magni, sum her sæst stríða seg inn um mállinjuna*

### Beinini doyðu

Eftir renninga var tað ein púra pøstan Magna, sum vit fingu orðið á. Leingi lá hann á triðja plássinum, men seinastu 50 metrarnar varð hann yvirhálaður, men sjálvur segði hann tó, at hetta hevði sína náttúrligu forkláring.

- Beinini doyðu bara fullkomuliga seinasta petti. Eg havi ikki runnið 800 metra teinin í eini trý ár, og tí var torført hjá mær at meta um, hvussu nógv eg skuldi leggja fyri.

- Eg kann so undir ongum umstøðum fara út at stýra eini slíkari renning, so tað er bara at hanga í.

Um vónirnar í finaluni sigur Magni, at hesar sum so ikki eru nakað serligar.

- Tað sær so ikki út til, at eg havi nakran møguleika har.

- Hetta er tó fyrstu ferð, at eg eri við, so eg sigi sum Páll (Guðlaugsson, blðm.), at eg eri við fyri at læra. Vit fáa so at síggja, hvar eg eri um tvey ár, tá Oyggjaleikir aftur verða. Tá ætli eg mær so at hava tikið føroyska metið, sigur Magni Mouritsen at enda.

# Heini í hálvfinaluni

**Heini Hátun kom víðari til hálvfinaluna í 200 metra renningini**

RENNING
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen – Isle of Man*

Eitt hitt sterkasta kortið á stuttu renniteinunum hjá føroyingum er Heini Hátun, sum støðugt tykist hava betrað seg sjálvan síðani undanfarnu Oyggjaleikir.

Fyrsta kappingin á hesum sinni hjá honum var 200 metra renningin, har hann sunnudagin tók lut í fjórðingsfinalunum. Hesar vórðu skipaðar soleiðis, at tveir teir fremstu í hvørjum heati, saman við fýra teimum av hinum rennarunum vunnu sær rætt at luttaka í hálvfinalunum.

### Á innastu breyt

At byrja við tóktist sera ilt at meta um møguleikarnar hjá Heina. Ilt var at meta um innanhýsis styrkina hjá flestu rennarunum, tí leingi gekk áðrenn tíðirnar komu, og at kalla hvørja ferð var onkur rennari av Cayman so langt fremstu millum rennararnar.

Heini gjørdist nummar trý í sínum heati, og tá tíðirnar endiliga vórðu lisnar upp, var greitt, at hann hevur vunnið sær pláss í hálvfinaluni. Tíðin hjá Heina var 23,5 sekund, og saman við einum øðrum rennara gjørdist hann sostatt skjótasti trý'arin. Hevði Heini verið í onkrum av hinum heatunum, kundi talan verið um eitt annað pláss.

Sjálvur tóktist Heini eisini væl nøgdur, tá vit práta við hann eftir renningina.

- Tíðin í sær sjálvum var ikki so góð, men tað er aloftast galdandi hjá øllum, tá talan er um fjórðingsfinalur. Allir hava helst runnið skjótari, enn teir gjørdu í dag, og til dømis hevur hasin, sum vann í okkar heati runnið 21,30 í ár.

- Talan var eisini um mótvind, umframt at eg lá í innasta bana, og tað er nakað, sum er sera tungt hjá mær, tí eg eri lutfalsliga stórur, sigur Heini.

### Vón um finalupláss

Um vónirnar at koma í finaluna, sum skal rennast mánakvøldið, sigur Heini, at tær eru á eini góðari leið.

- Eg rokni við at renna skjótari í morgin. Seinasta vikuskifti rann eg 23,0, og megni eg aftur hetta, so skuldi tað verið nóg mikið til eitt finalupláss, so tað er avgjørt tað, sum eg fari eftir, sigur Heini Hátún at enda.

Umframt 200 metra renningina er Heini eisini meldaður til 100 og 400 metrar, men enn er ivasamt, um hann fer at luttaka í báðum hesum kappingum.




gult25 cyan25 magenta25 svart25



# Kvinnurnar 0,1 stig frá at fáa bronsumerki

**Mánadagin varð farið í holt við liðkappingina í fimleiki, og at síggja til gongst væl hjá føroysku kvinnunum**

FIMLEIKUR
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen – Isle of Man*

Beint áðrenn evstamark okkara vóru føroysku kvinnurnar lidnar við gólvíðkanina í fimleiki.

Undan kappingini var roknað við, at í fimleikinum fór tað at vera á mannfólkasíðuni, at Føroyar fóru at standa seg best, men eftir fyrstu íðkanina tykjast kvinnurnar ikki at standa nakað aftanfyri.

Beint fyri evstamark okkara frættu vit, at kvinnurnar einans vóru 0,1 stig frá at fáa bronsumerki.

Myndamaðurin var á staðnum, og myndirnar her á síðuni tala helst sítt týðiliga mál um, at tær vóru nøgdar um avrik síni.



# Mótstøðan var ov hørð

**Thriatletarnir hjá Føroyum endaðu væl uttan fyri heiðursmerkjarøðina, tá kappast varð sunnudagin**

THRIATHLON
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen — Isle of Man*

Tað varð roknað við undan kappingini, og tað varð eisini staðfest, tá kappast varð, at traditiónirnar fyri góðum thriathlon-úrslitum vóru størri hjá fleiri av mótstøðulondunum, enn tær vóru hjá Føroyum, sum eru at kalla nýbyrjarar á økinum.



*Føroyska Thriathlon liðið stóð seg hampuliga væl sunnudagin í fyrstu roynd síni á Oyggjaleikunum, har ítróttin annars er nýggj kappingargrein*

Serstakliga vóru tað tey av Jersey, sum tóktust sterk í hesi ítróttini, og av seks møguligum heiðursmerkjum fyri einstaklingar, tóku tey á Jersey sær av teimum fimm.

Sterkasta kortið hjá Føroyum vísti seg sum væntað at vera Føroyar, og avrikið hjá honum rakk til eitt 16. pláss sambært almennu hagtølunum. Tíðin hjá Gunnari var 2.14,29, og var tað góðar 15 minuttir verri enn frensti íðkarin.

Beinir Rasmussen gjørdist nummar 40 í tíðini 2.30,18, meðan Kári Simonsen gjørdist nr. 46 í tíðini 2.38,10.

Hjá kvinnunum gjørdist Helga Mikkelsen nummar 13 í tíðini 3.09,19. Vinnarin her hevði tíðina 2.27, 27.

### Súkklingin kiksaði

At plaseringin hjá Gunnari ikki gjørdist somikið góð, sum hann hevði vónað, komst serliga av, at hann ikki stóð seg so væl sum vanligt í súkklingini. Eftir at hann hevði mist hampuliga nógva tíð í svimjingini, gekk annars væl fyrstu 20 kilometrarnir av súkklingini, og munurin minkaði. Líkt var tó til, at Gunnar hevði lagt ov nógv fyri, og og hann dragnaði alsamt meira.

Alt í alt var talan sostatt ikki um eitt so øgiliga gott úrslit hjá thriathletunum, men hinvegin fekst so eisini at vita, hvar vit flóta í hesum, og tá talan er um eina at kalla spildurnýggja ítrótt hjá okkum, er lítið at ivast í, at talan fer at verða um framgongd komandi árini.

## Spæla um sjeynda plássið

Føroyska badmintonlandsliðið stóð seg ikki so væl, sum væntað í badminton kappingini.

Ein heldur óvæntaður sigur hjá Hetlandi viðførdi, at Føroyar duttu dekan ov langt aftur í bólkaspælinum, og mánadagin skuldu teir spæla um sjeynda plássið í kappingini.

Meira verður at frætta frá teimum í morgin.

*jm*

# Blandað í borðtennis

**Úrslitini hjá føroyska liðnum vóru yvirhøvur ov óstøðug sunnudagin, og spurningurin er, hvat liðið kann vinna inn aftur mánadagin**

BORÐTENNIS
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen — Isle of Man*

Borðtennislandsliðið hjá Føroyum fór undir liðkappingina ígjár, og yvirhøvur var talan um eina blandaða uppliving.

Fyrsti dysturin var móti Saaremaa, og longu undan byrjanini førdu Føroyar 3-0, tí Saaremaa ongar kvinnur hevur á liðnum. Talan varð sostatt bert um mansdystir, og her vann Kjartan Eli Hentze báðar sínar singlur, meðan Finnbjørn Zachariasen vann eina, soleiðis at samlaða úrslitið av dystinum gjørdist 6-1 til Føroyar.

### Guernsey styrkt

Síðani varð dystast móti Guernsey, og undan dystinum høvdu føroyingar góðar vónir um dystin. Tað skuldi tó vísa seg, at Guernsey er farið nógv fram síðani seinastu leikirnar, og ikki minst kom tað illa við, at Kjartan Eli tapti í fyrsta dystinum hjá sær.

Einastu sigrarnir, sum Føroyar fingu í hesum dystinum vóru seinni einmansleikurin hjá Kjartani Eli og blandaði tvímansleikurin, har Kjartan Eli og Maria Petersen umboðaðu Føroyar.

Hóast úrslitið ikki var eftir vild, so tóktust føroyingar eftir dystin at ásanna, at talan hevði verið um sterka mótstøðu, og at Guernsey høvdu tikið seg nógv fram síðani seinastu leikirnar. Til komandi dystirnar eru vónirnar ógvuliga blandaðar, og spurningurin er, hvussu langt føroyska fer at røkka hesaferð. Heiðursmerki verður talan neyvan um.



*Maria Petersen var partur av blandaða tvímansleikinum, sum Føroyar vunnu á Guernsey*